# Kanna møguleikan fyri at fara í hægstarætt

**Hóast Tvøroyrar Kommuna hevur tapt bæði í Føroya Rætti og í Landsrættinum,ætlar býráðið ikki at leggja kongin, tí tey halda seg hava eina góða sak**

RÆTTARMÁL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Ósemjan ímillum Strandferðsluna og Tvøroyrar Kommunu um havnagjaldið hjá Smyrli, er ikki liðugt enn.

Tvøroyrar Býráð hevur kravt, at Smyril skuldi betala meiri í havnagjaldi, men higartil hevur tað gingið strilti at fáa undirtøku fyri kravinum.

Her er talan um gjald fyri gamla Smyril, sum brúkti havnina á Drelnesi, ið kommunan sjálv bygdi og átti.

Talan er um eina munandi upphædd, sum kommunan hevur kravt í meiri havnagjaldi og Strandferðslan hevur víst á, at fær Tvøroyrar Býráð viðhald, skal Strandferðslan betala kommununi einar níggju milliónir krónur.

Málið endaði í Føroya Rætti, men har tapti kommunan. Hon skeyt málið inn fyri Landsrættin, men har tapti kommunan eisini.

Men á býráðsfundi á Tvøroyri fríggjakvøldið varð gjørt av at kanna møguleikarnar fyri at sleppa í hægstarætt við málinum.

Løgfrøðingurin hjá Kommunusamskipan Føroya, har Tvøroyrar Kommuna er limur, hevur nú málið til gjøgnumgongd fyri at fáa eina nýggja, løgfrøðiliga meting.



*Tvøroyrar býráð gevst ikki á hendur, hóast bæði Føroya Rættur og Landsrætturin hava gingið teimum ímóti. Kommunan vil framvegis hava hægri gjald fyri gamla Smyril og hon við eisini hava gjald fyri nýggja Smyril*

Tvøroyrar Býráð sigur, at tá ið ein niðurstøða er komin frá honum, skal støða takast til, um býráðið skal søkja um at fáa málið fyri hægstarætt.

Á Býráðsfundinum fríggjakvøldið metti býráðsformaðurin framvegis, at tey høvdu eina góða sak, tí hann metti, at hóast Tvøroyrar Kommuna tapti bæði í Føroya Rætti og í Landsrættinum er ikki samsvar ímillum báðar dómarnar.

Í Føroya Rætti taptu vit, tí at vit ikki høvdu ein serskildan roknskap fyri Havnina á Drelnesi. Men í Landsrættinum taptu vit tí at allur roknskapirnir hjá havnunum skuldu leggjast og tilsamans máttu teir ikki geva avlop. Teir skuldu somuleiðis vera inni í kommunala roknskapinum.

Tí heldur býráðið, at samsvar er ikki ímillum grundgevingarnar fyri dóminum og sostatt kanna tey møguleikarnar fyri at royna málið í Hægstarætti.

## Meiri havnagjald

Men Tvøroyrar Býráð steðgar ikki her.

– Vit halda okkum eisini hava rætt til havnagjald fyri nýggja Smyril og tað er ein spurningur, sum vit taka upp við Strandferðsluna og landsstýrið, sigur Kristin Michelsen, borgarstjóri á Tvøroyri.

Hann sigur, at hóast tað er landið, sum hevur gjørt og eigur nýggju samferðsluhavnina á Krambatanga, eigur Tvøroyrar Kommuna rætt til havnagjald.

Skip, sum leggja at bryggju skulu vanliga betala havnagjald, brúgvagjald og vørugjald.

– Vit krevja ikki brúgvagjald og vørugjald, tí bryggjan er landsins ogn, men vit halda framvegis, at Strandferðslan eigur at rinda havnagjald fyri at koma inn í Havnina, ella inn á fjørðin.

Kristin Michelsen vísir á, at í Havnini rindar Strandferðslan bæði havnagjald, bryggjugjald og vørugjald og tí heldur hann, at Tvøroyrar Kommuna eisini hevur rætt til havnagjald fyri nýggja Smyril, hóast sjálv bryggjan er landsins ogn.

# Krevja frágreiðing frá Jógvani á Lakjuni

**Landsstýrismálanevndin, sum hevur eftirlit við embætisførsluni hjá landsstýrinum, krevur nú eina frágreiðing frá landsstýrismanninum í mentamálum um ætlanin at siga ein lærara á Vinnuskúlanum, upp**

UPPSØGN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú er eisini landsstýrismálanevndin komin upp í sakina um ætlanina at siga ein lærara úr starvi á Vinnuskúlanum.

Landsstýrismálanevndin hevur eftirlit við embætisførsluni hjá landsstýrisfólkum og nevndin hevur nú kravt eina frágreiðing frá Jógvani á Lakjuni, landsstýrismanni í mentamáli, sum varar av málinum.

Ætlanin var at siga ein lærara á Vinnuskúlanum upp tí hann hevði fingið at vita, at ein starvsfelagi framvegis fekk fulla løn, hóast hann var farin undir útbúgving. Tað spurdi hann mentamálaráðið um, tí hann helt, at allir lærara áttu at fáa somu sømdir. Men hetta var tikið sum óloyal framferð og tí var ætlanin at siga hann upp.

Í løgtinginum hevur Jógvan á Lakjuni sagt, at hann kendi ikki til málið.

Lærarin, sum ætlanin var at siga úr starvi, Páll I. Joensen hevur áður sent málið til Løgtingsins Umboðsmann.

Men hann hevur eisini vent sær til landsstýrismálanevndini við málinum, tí hann góðtekur ikki framferðina í málinum.

Hann sigur, at fyri honum er tað greitt, at Mentamálaráðið vil ikki hava, at allur sannleikin kemur fram í málinum og at mentamálaráðið veit meiri um málið enn tað letst.

## Biðja um frágreiðing

Kári P. Højgaard, formaður í Landsstýrismálanevndini, sigur, at enn hevur nevndin ikki gjørt av, um hon tekur málið upp.

Men fyribils hevur nevndin biðið Jógvan á Lakjuni, landsstýrismann í mentamálum, um eina frágreiðing.

– Landsstýrismálanevndin hevur gjørt av at biðja Mentamálaráðið um eina frágreiðing um málið og at senda nevndini allar viðkomandi upplýsingar, sigur Kári P. Højgaard.



*Jógvan á Lakjuni skal nú svara fyri, hvat hann visti um ætlanin at siga ein lærara á vinnuskúlanum upp*

Hann sigur, at Mentamálaráðið er eisini biðið um at senda landsstýrismálanevndini øll viðkomandi skjøl í málinum og tær viðmerkingar, sum Mentamálaráðið møguliga hevur havt til málið.

Tá ið allir upplýsingar eru fingnir til vega frá Mentamálaráðnum, tekur landsstýrismálanevndin støðu til, um hon skal taka hetta upp til viðgerðar.